# Venjaraleiðin

**Sum liður í heildarætlanini “Kvinnur á vøllin”, eggja vit kvinnum til at ‘biðja um bóltin’ og gerast virkin partur av fótbóltsfamiljuni.**

Venjaraleiðin er fyri kvinnur, sum hava hug og hegni til at fara undir hægri venjaraútbúgving og á tann hátt vera við til at hækka støðið á føroyskum fótbólti. Talan er um eitt skeið, har luttakararnir taka B2 og B3 í eini serligari tilgongd, sum er ætlað kvinnuligum venjarum:

- 12. – 14. februar
- 29. apríl – 1. mai (við gisting á gistingarhúsi)
- September/november

Upptøkukrav til skeiðið er B1, og eftir lokið skeið verða luttakararnir eggjaðir til at fara víðari á B4 – hetta er tó ikki eitt krav fyri luttøku.

Skeiðið er ókeypis, og matur á skeiðsdøgunum, umframt gisting í døgunum 29.4 – 1.5 er íroknað luttøkuni.

20 pláss eru á skeiðinum, og treytirnar fyri at taka lut eru:

- At umsøkjarin hevur B1*
- At umsøkjarin er sinnað at taka lut allar skeiðsdagarnar
- At umsøkjarin er áhugað í at vera virkin sum venjari eftir lokið venjaraskeið

Umsókn fer fram við at fylla út viðfesta umsóknarskjal og senda til teldupost til Pætur S. Clementsen, Tekniskan stjóra í FSF (psc@football.fo) við.

Meira fæst at vita um skeiðini við at venda sær til Pætur Smith Clementsen á teldupost psc@fsf.fo ella á tlf. 291964

*****Umsøkjarar við B2 prógvi kunnu eisini søkja og møguliga verða frítiknar fyri uppmøting til ein part av skeiðnum.*